# Hevur ringar vónir fyri Landssjúkrahúsinum

*– Heldur Landsstýrið fast við fíggjarpolitikkin, sum er stungin út í kortið, verður alt ov lítið eftir til Landssjúkrahúsið, sigur Kristjan Magnussen, fyrrverandi landsstýrismaður í heilsumálum*



*Kristian Magnussen, fyrrverandi landsstýrismaður sigur, at eftir fíggjarlógini eru tær almennu íløgurnar lægri í Føroyum, enn tær eru í øðrum londum*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað nyttar ikki at blíva við at tveita Landssjúkrahúsinum nakrar snøklar her og nakrar snøklar har.

– Nú má okkurt veruligt gerast. Og tess longri vit bíða, tess dýrari verður tað.

Kristian Magnussen, fyrrverandi landsstýrismaður í almanna og heilsumálum, stúrir fyri gongdini á okkara høvuðssjúkrahúsi.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum leygardagin hava serfrøðingar kannað viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Niðurstøðan er, at støðan á Landssjúkrahúsinum er so hættislig, at tað er átrokandi neyðugt brúka ikki minni enn 500 milliónir til umvælingar, umbyggingar og útbygging tey næstu 10 árini - umframt tað, sum skal brúkast til vanliga raksturin.

### Vánalig útlit

Men fyrrverandi Landsstýrismaðurin stúrir fyri, at við tí politikki, sum hetta landsstýrið førir, eru vánalig útlit til, at nakað veruligt verður gjørt við Landssjúkrahúsið.

–Hyggja vit eftir frágreiðingini, sum Karsten Hansen legði fram um fíggjarpolitikkin í 2001 og frameftir, mugu vit bara staðfesta, at vónirnar eru vánaligar um, at nakað munagott verður gjørt við Landssjúkrahúsið.

Kristian Magnussen sigur, at í ár metti bygginevndin, at tað var neyðugt at seta 30 millionir av til ymsar íløgur á Landssjúkrahúsinum. Men tað blivu bara 10 milliónir settar av.

– Samstundis ger Karsten Hansen greitt, at landsstýrið ætlar ikki at brúka meiri pening til byggingar og útbyggingar enn í ár.

– So verður ikki meiri ferð sett á eru vánalig útlit til, at Landsjúkrahúsið nakrantíð kemur uppundan aftur.

Og hetta er ein gongd, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin staðiliga ávarar ímóti, tí tess longri bíðað verður við at tess dýrari verður tað, og tess vandamiklari er tað fyri virksemið á Landssjúkrahúsinum.

*Trupulleikin á Landssjúkrahúsinum er ikki nýggjur. M.a. hevur tú sjálvur umsitið málið í Landsstýrinum, men tá var heldur ikki tað stóra gjørt?*

– Tað er rætt. Men tá ið eg kom í tingið, máttu vit leggja eina fíggjarlóg, sum hevði yvir 300 milliónir í halli fyri at hava samfelagshjólini malandi.

– Nú hava fíggjarlógirnar 700 milliónir í yvirskoti.

– Tað er ein munur uppá eina heila milliard og tí eru umstøðurnar at gera nakað heilt øðrvísi nú, sigur Kristian Magnussen.

Hann sigur, at eitt, sum politikarar mangan føra fram, er, tað mugu ikki gerast og stórar íløgur í miðøkinum, tí her er so nógv virksemi frammanundan. Tí visir tað seg at vera ein illvilji ímóti at fara í holt við hesa útbyggingina

– Men nú liggur Landssjúkrahúsið av tilvild í Havnini, og hetta er ein trupulleiki, sum má loysast nú. Og vit skulu minnast til, at talan er um eitt Landssjúkrahús, sum er sjálvt hjartað í føroyska heilsuverkinum. Virkar tað ikki, virkar heldur onki annað lið í heilsuverkinum.

– Tí er bara eitt at gera, og tað er at fara ígongd, sigur Kristian Magnussen

### Sjúkrahús framum studentaskúla

Fyrrverandi Landsstýrismaðurin sigur, at eftir fíggjarlógini eru tær almennu íløgurnar lægri í Føroyum, enn tær eru í øðrum londum.

– Tí ber tað væl til at hækka íløgurnar.

– Og tað er heldur ikki ein spurningur um at hava ráð, tí tað er ov mikið av pengum í Landskassanum.

– Men tvíheldur Landsstýrið um, at íløgurnar skulu ikki vera hægri enn tær eru, mugu íløgurnar raðfestast.

– Eitt nú er tað fullkomiliga burturvið, at samgongan í fullum álvara arbeiðir við at byggja nýggjan studentaskúla í Havnini, sum kanska fer at kosta eina hálva milliard, tá ið avtornar.

– Hetta er tann blanki ørskapur, tí hetta er ikki annað, enn at onkur politikari vil reisa sær minnisvarða.

Kristian Magnussen sigur, at tað ber væl til at nøkta tørvin við at byggja skúlan í Hoydølum út.

– So ætlanin at byggja nýggjan skúla kann saktans leggjast til síðis, uttan nakað hóvasták og peningurin brúkast til Landssjúkrahúsið ístaðin, sum hevur nógv størri týdning.



*– Longri vit bíða, dýrari verður tað at umvæla Landssjúkahúsið, so at tað ikki rapar, og so at útbyggja tað, so at tænastan verður nóg góð, sigur Kristian Magnussen*

– Hetta er ein spurningur um raðfesting, tí tað gongur ikki longur at tveita Landssjúkrahúsinum nakrar snøklar nú og nakrar snøklar tá.

Hann heldur, at hetta er eisini ein spurningur um at hava virðing fyri teimum, sum betal skatt.

– Fólk betala skatt fyri at fáa ymsar tænastur afturfyri, fyrst og fremst eitt gott heilsuverk, almannaverk og eitt gott skúlaverk, umframt ymiskt annað. Men her hava vit tað paradoksið, at umframt tað, hava vit eina samgongu, sum leggur pengingin til síðis til eina ávísa politiska ætlan.

*Grundgevingin er eisini, at vit mugu ansa eftir, at vit ikki seta ov nógva ferð á búskapin?*

– Tað er rætt. Men, hvat skal Landssjúkrahúsið gera við tað. Har er støðan tann, at tað er heilt bráðneyðugt at gera íløgur uppá 500 milliónir tey næstu 10 árini.

– Og tað ber ikki til, at heilsuverkið framvegis skal verða rikið, sum um vit høvdu djúpastu kreppu í landinum.

### Eisini í Suðuroy

Kristian Magnussen harmast stórliga um, at nú verður sama mistak gjørt á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum er gjørt á Landssjúkrahúsinum.

– Har er játtanin so lítil, at tað verður neyðugt at taka frá rakstrinum til lønir.

– Tað er heilt hol í høvdið, tí tað førir bara við sær, at bygningarnir fella í órøkt, t í teir fáa ikki tað viðlíkahaldið, sum krevst fyri at varðveita teir á sama støði, sum eru á nuú- og sum teir skulu vera á, sigur Kristian Magnussen.













# Føroysku sjúkrahúsini mist eina heila milliard

*Sjúkrahúsini hava mist nógvar pengar, síðani blokkstuðulsskipanin varð sett í verk í 1988*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hesi seinastu 13 árini hava føroysku politikararnir nápað næstan eina heila milliard frá teimum føroysku sjúkrahúsinum.

Hetta sæst á eini talvu, sum serfrøðingar hava gjørt, og sum vit hava fingið fatur á.

Áðrenn vit fingu blokkin var ríkisstuðulin úr Danmark ein ávísur prosentpartur av ymsum útreiðslum í Føroyum.

Men síðani er prosentparturin, sum sjúkrahúsverkið fær av blokkinum alsamt minkaður soleiðis, at tey trý sjúkrahúsini fáa nú nógv minni part av blokkinum, enn tey fingu av tí gamla ríkisstuðulin.

Tað sæst, at hesi seinastu 13 árini, síðani blokkurin kom, hava tey trý sjúkrahúsini soleiðis mist næstan eina milliard.

Sum tað sæst á talvuni, hevur menningin í føroyska sjúkrahúsverkinum eisini verið nógv minni enn í Danmark, tí har eru játtanin vaksin nógv skjótari enn í Føroyum.

| ÁR | BLOKKUR | Sjúkrahúsverk FR | Heilsuverk DK | INDEKS | INDEKS | INDEKS | Vøkstur sum Blokk | "Mangul" |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1.000 kr. | 1.000 kr. | M. kr. | "blok" | "FR" | DK | FR | |
| | | | | | | | 1.000 kr. | 1.000 kr. |
| 1988 | 683.021 | 325.331 | 60.756 | 100 | 100 | 100 | 325.331 | 0 |
| 1989 | 730.299 | 340.352 | | 107 | 105 | | 347.850 | 7.498 |
| 1990 | 752.497 | 294.814 | 61.376 | 110 | 91 | 101 | 358.423 | 63.609 |
| 1991 | 770.877 | 295.858 | | 113 | 91 | | 367.178 | 71.320 |
| 1992 | 789.000 | 302.591 | | 116 | 93 | | 375.810 | 73.219 |
| 1993 | 814.392 | 297.000 | | 119 | 91 | | 387.905 | 90.905 |
| 1994 | 816.628 | 304.774 | | 120 | 94 | | 388.970 | 84.196 |
| 1995 | 852.353 | 302.298 | 68.356 | 125 | 93 | 113 | 405.986 | 103.688 |
| 1996 | 866.786 | 311.703 | | 127 | 96 | | 412.860 | 101.157 |
| 1997 | 897.604 | 325.193 | 72.278 | 131 | 100 | 119 | 427.539 | 102.346 |
| 1998 | 920.490 | 337.295 | 75.332 | 135 | 104 | 124 | 438.440 | 101.145 |
| 1999 | 944.300 | 348.542 | | 138 | 107 | | 449.781 | 101.239 |
| 2000 | 969.000 | 362.224 | | 142 | 111 | | 461.546 | 99.322 |
| | | | | | | | | 999.645 |

Talvan vísir, hvussu stór játtanin til tey føroysku sjúkrahúsini hevur verið seinastu árimi og, hvussu stór, hon hevði verið, um heilsuverkið framvegis skuldi fingið líka stóran part av ríkisstuðlinum úr Danmark, sum tað fekk, áðrenn blokkkstuðulin kom. Sum tað sæst, hava sjúkrahúsini mist næstan eina heila milliard, síðani blokkurin kom. Fyrsti teigurin er gongdin í blokkinum. Annar teigurin er gongdin í játtanini til sjúkrahúsverkið í Føroyum og triði teigurin er gongdin í játtanini til sjúkrahúsverkið í Danmark. Síðani koma tríggir teigar við vísitølum, fyrst yvir gongdina í blokkinum, síðani yvir gongdina í játtnini til føroyska sjúkrahúsverkið og at enda vísitøl yvir játtina til sjúkrahúsverkið í Danmark. Í næstsíðsta teigi sæst, hvussu stór játtnin til føroyska sjúkrahúsverkið átti at verið, um tað fekk líka stóran part av blokkinum, sum tað fekk av gamla ríkisstuðlinum. Og í seinasta teiginum sæst, hvussu nógv manglar í hvørt ár.

# Sjálvstýrisflokkurin ósamdur um fullveldismálið

*Meðan partar av lyklapersónum Sjálvstýrisfloksins taka fult undir við mannagongdini í fullveldismálinum, halda onnur í flokkinum, at ferðin má setast niður*

JOHN JOHANNESSEN

Mangt er, sum bendir á, at limir Sjálvstýrisfloksins, skulu vænta sær eina harða uppgerð um fullveldismálið á landsfundinum, ið verður í Klaksvík 5. mei. Tað er í øllum førum heilt greitt, at høvðuspersónar floksins ikki eru samdir um førda politikkin í fullveldismálinum.

Sjálvt teir báðir tinglimir Sjálvstýrisfloksins, Sámal Petur í Grund og Jákup Sverri Kass draga hvør sína línu í hesum máli. Meðan Sámal Petur í Grund heldur ferðina vera ov líta, heldur Jákup Sverri Kass, at landsstýrið hevur sett alt ov nógva ferð á fullveldisætlanina.

### Stutt skiftistíð besta loysnin

Sámal Petur í Grund heldur tað vera best, at vit gerast sjálvstøðug so skjótt sum møguligt. Tí mælir hann landsstýrinum frá at heingja seg ov nógv spurningin um búskaparliga skiftistíð. Hann heldur heilt greitt, at landsstýrið skal taka av tilboðnum frá donsku stjórnini um eina skiftistíð á trý til fýra ár.

– Eg rokni við, at hatta tilboðið inniheldur eina kapitalisering, ið ger, at vit fáa eins nógvan pening burturúr, sum vit fáa, um vit minka blokkin so við og við eftir 15 árum, sigur Sámal Petur í Grund.

Sjálvstýristingmaðurin ger greitt, at tað altíð kostar at slíta eitt samband. Men samstundis heldur hann, at pínan verður minni, jú skjótari loysingin verður avgreidd.

Sámal Petur í Grund samanber støðuna við tá lomvigapisan fyrstu ferð skal á flog. Hann sigur, at um lomvigapisan slapp av gera av, um hon skuldi tveitast av rókini, hevði hon uttan iva útsett til í morgin. Men hon sleppur ikki at taka nakra avgerð í hesum máli. Hon verður tveitt av rókni, og tá uppdagar hon, at hon beinanvegin dugir at flúgva.

Kortini ásannar Sámal Petur í Grund, at tað í fullveldismálinum ikki bert snýr seg um eina fíggjarliga skiftistíð, men eisini um eina sálarliga skiftistíð. Og hann er greiður yvir, at vanligi føroyingurin heldur skiftistíðina á fýra ár vera ov stutta. Men kortini heldur Sámal Petur tað eisini vera best sálarliga, at hava stutta skiftistíð.

– Ein skiftistíð er altíð torfør. Men er hon long, er talan um seigpíning. Tí er best, at vit fáa hana avgreidda so skjótt sum møguligt, sigur hann.

### Mugu hava fimtan ár

Hin sjálvstýristingmaðurin, Jákup Sverri Kass, tekur als ikki undir við sjónarmiðunum hjá Sámal Peturi í Grund. Hann metir tað vera avgjørt neyðugt, at skiftistíðin verður fimtan ár, eins og landsstýrið leggur upp til.

Hóast ein búskaparlig skiftistíð kann innihalda eina kapitalisering, soleiðis at hon gevur eins nógvan pening, sum ein jøvn niðurgongd í blokkstuðulinum yvir 15 ár, metir Jákup Sverri Kass ikki, at vit koma at klára okkum við so stuttari skiftistíð.

– Føroyska samfelagið klárar ikki at stilla seg um eftir so stuttari skiftistíð. Heldur ikki, um ein skiftistíð á fýra ár gevur okkum eins nógvan pening, sum modellið við 15 árum, sigur Jákup Sverri Kass.

Ungi sjálvstýrismaðurin ger greitt, at tað er búskaparliga frælsið, ið avgerð, um vit eru persónliga fræls. Tí heldur hann tað hava alstóran týdning, at búskaparliga skiftistíðin verður so góð, sum møguligt.

– Eg vil fegin gera greitt, at eg haldi ferðina vera ov nógva í fullveldismálinum beint nú, sigur Jákup Sverri Kass og vísir á, at hann er sjálvstýrismaður og ikki loysingarmaður.

*Sámal Petur í Grund er eitt av sjálvstýrisfólkunum, ið vil hava enn meira ferð á fullveldismálið*

